

*Seinasta lagið hjá Teiti varð upprunaliga gjørt í skemti. Ætlanin var bert at spæla tað einaferð. Men longu fyrstu ferð tað var spælt, var móttøkan so góð, at tað gjørdist fastur partur av spæliskránni*

fóru av pallinum aftur. Ístaðin kom kendi danski tónleikasnillingurin Kresten Osgod á pallin. Hann er kendur úr Jazzumhvørvinum í Danmark, og hevur millum annað spælt trummir hjá Caroline Henderson. Teitur og Kresten kennast og høvdu júst skriva eitt lag saman. Nýggja lagið æt "Louie Louie". Kresten spældi Rhoads og Teitur gittara og sang. Lagið bar brá av, at tað var nýskrivað, og var ikki eitt av minniligu løgunum á konsertini. Á næsta lagnum "To meet you" spældi Kresten Osgod trummir og bassurin kom við aftur.

Teitur spurdi um vit høvdu hitt kendasta gestin hetta kvøldið: Jólamannin. Jólamaðurin arbeiddi í barrini eitt skifti og gekk annars runt og tosaði við fólk. Teitur segði: at jólamaðurin kundi geva okkum, tað sum vit ynsktu, og at sambært jólamanninum, var ein genta sum æt Mette á konsertini og hon ynskti sær ein mann.

### Salurin livdi við

Strúkararnir vóru komnir á pallin og lógvabrestinir mundu ongan enda taka, tá tey spældu løgini: "You're the ocean", "Rough around the edges", "Josephine", "I was just thinking" og "Amanda's dream". Salurin livdi allur við.

Áðrenn Teitur fór undir seinasta lagið, minti hann á, at um fólk vildu hoyra meira kundu tey bara klappa eitt sindur. Eg haldi at tað var lekkurt, at hann var eitt sindur ironiskur um ein av teimum mest láturligu siðunum innan mentan.

Seinasta lagið hjá Teiti varð upprunaliga gjørt í skemti. Ætlanin var bert at spæla tað einaferð. Men longu fyrstu ferð tað var spælt, var móttøkan so góð, at tað gjørdist fastur partur av spæliskránni. Nú var tað seinasta lag á skránni. Talan var um eina fráíka tolking av "Great balls of fire" hjá Jerry Lee Lewis. Teitur og bólkurin fóru av pallinum. Men vóru klappaðir út aftur tvær ferðir.

### Du tror vist på Julemanden

Tá Teitur kom út aftur á pallin, rópti ein kvinnurødd: "Teitur, jeg elsker dig!". Teitur var skjótur at svara: "tal med julemanden". Tá ein maður rópti "Teitur, jeg elsker dig!", svaraði hann "Du tror vist på Julemanden!".

Eykaløgini hann spældi vóru trý nýggj løg: "I run the Carrousel", "Hanging my worries out to dry" og "Waiting for mars to come out" Serliga tey bæði seinastu løgini vóru framúrskarandi. Í "Hanging my worries out to dry" var eitt petti har Teitur bríkslaði. Hann segði, at um sangurin skuldi innspælast skuldi Kim Larsen bríksla hetta pettið.

### Málslig suppa

Konsertin varð filmað, og Teitur skuldi tí upprunaliga tosa á enskum millum løgini. Men hann gloymdi hetta í heilum, og skifti aftur til danskt alla tíðina. Hetta var rættuliga stuttligt, og hann dugdi ótrúliga væl at brúka málsligu suppuna sum krydd til framførsluna.

Samanumtikið fingu vit eina frálíka tónleika-uppliving. Teitur legði Vega fyri sínar føtur, og tá DVD'in kemur út einaferð næsta ár, fari eg at keypa hana og siga: "Eg var har!"

# Hvat dámdi tær?

**Millum nógvu áhoyraranar, sum vóru í Vega leygarkvøldið, vóru eisini fleiri kend andlit úr føroyska tónleikaheiminum. Vit spurdu nakrar teirra um teirra meting av framførsluni hjá Teiti**



*Lehnert Kjeldsen*
*Z og fyrrverandi gittarleikari í Chase.*

Mær dámdi sera, sera væl konsertina. Hon var sera frálík. Teitur letur hurðarnar til útheimin upp fyri føroyskum tónleiki. Hann leggur grundarsteinurin fyri eina føroyska tónleikavinnu.

Teitur hevur ótrúligar gávur at siga frá søgum og fáa fólk til at lurta eftir teimum. Hann hevði áhoyraranar í sínari hulu hond. Fólk livdi við í framførðsluni. Sjálvt um hetta var ein friðarlig konsert so var fokus móti pallinum alla tíðina. Stórur partur av áhoyrarunum vóru rættiliga ung fólk og Teitur fekk eisini fatur í teimum.

Tað er torført at peika á nakað hæddarpunkt. Øll konsertin var fantastisk. Teitur hevur nakað! Hann er í serflokki!

Tað er ringt at spáa um framtíðina, men eg vænti at hjá Teiti gongur tað bara uppeftir. Tónleikaídnaðurin er illa fyri vegna skeivar raðfestingar. Øll orka er brúkt uppá Fastfood tónleik, so kreppan er sjálvskapt. Marknaðurin er svangur eftir tónleiki sum kemur innanífrá, ein revolutión er í gongd. Teitur rakar henda marknað.



*Hallur Johannesen*
*Tónleikari*

Mær dámdi stak væl konsertina. Teitur leveraði! Havi tó sæð hann betur. Eg varð ikki líka tikin av framførðsluni sum onkuntíð fyrr. Haldi sum so ikki konsertin var verri enn aðrar hjá honum, men heldur ikki betur.

Konsertin hevði tvey hæddarpunkt, tað fyrsta var byrjanin, tá Teitur spældi einsamallur á kassagittara, hann dugir øðiliga væl hatta. Hitt hæddarpunkti, var nýggja lagi: »Hangin my worries out to dry«.



*Róin Siggertson*
*Tónleikari og Realitystjørna*

Eg eri pávastoltur av mínum landsbróðuri. Teitur leggur lunnar undir føroyskan tónleikaídna. Vit hava nógv talentir í Føroyum, og Teitur vísir vegin.

Hann spældi nógvar sangir sum raktu okkurt í mær. Man hoyrir á sangunum at hann hevur smakkað lívið. Hann hevur ikki bara grivið seg niður, tað gevur sangunum substans.

Hæddarpunkti var: »Sleeping with the lights on«. Tað er tann sangurin sum enn situr fastur í høvdinum.